UTTAN ÚR HEIMI

## Ber ótta fyri borgarakríggi

Egyptiski forsetin, Hosni Mubarak, ber ótta fyri, at borgarakríggj kann bresta á í Irak, tá kríggið har er liðugt.

Mubarak stúrir fyri, at shiamuslimar og sunnimuslimar fara at bresta saman. Eisini væntar hann, at kurdarnir fara at krevja at fáa sítt egna ríki har norðuri í Irak, men at hetta kann verða av ongum, tí Turkaland er so hart ímóti tí. Sjálvur heldur Mubarak, at tað hevði verið ein vanlukka, verður Irak býtt sundur, og hann heldur ikki, at irakska fólkið vil hava landið sundurbýtt.

Sunnudagin fréttist frá samanbrestum millum shiamuslimar og sunnimuslimar í fleiri býum í Irak. Í býnum Najaf kringsetti ein víðgongdur bólkur húsini hjá einum shiamuslimskum leiðara og kravdi, at hann skuldi fara av landinum innan 48 tímar. Hetta hendi bert tríggjar dagar eftir, at ein shiamuslimskur leiðari varð myrdur í sama býi.

## Ferðafólk helst burturflutt

Seinastu tíðina hevur verið leitað eftir 31 evropeiskum ferðafólkum, sum eru horvin í Algeria. Talan er um fimtan týskarar, tíggju eysturríkarar, fýra sveitsarar, ein niðurlending og ein svia.

Í fyrstani varð hildið, at ferðafólkini mundu vera vilst í Sahara-oyðimørkini, men nú halda algerisku myndugleikarnir, at tey helst eru vorðin burturflutt. Sambært einari eysturríkskari sjónvarpsstøð eru ferðafólkini býtt sundur í tveir bólkar, men hvør hevur burturflutt tey, ella hvar tey eru, veit eingin. Burturflytararnir hava heldur ikki latið frætta frá sær.

Eysturríkski uttanríkisráðharrin, Benita-Maria Ferrero-Waldner, segði seg sunnudagin hava vónir um, at ferðafólkini framvegis eru á lívi, og í gjár segði týski innanríkisráðharrin, Otto Schilly, tað sama.

## Bush avlýsir ferð

Ætlanin var, at amerikanski forsetin, George W. Bush, skuldi fara til Kanada at vitja tann 5. mai, men nú hevur hann avlýst ferðina.

Kanadsiska stjórnin sigur, at tað er kríggið í Irak, sum hevur fingið Bush at avlýsa ferðina norður um markið. Kanadiski forsætisráðharrin, Jean Chretien, sigur, at hann skilir avgerðina hjá amerikanska forsetanum væl, og at nú verður roynt at kanna, nær ferðin kann koma í lag, men helst verður tað ikki fyrr enn í heyst.

Kanada var eitt av londunum, sum var harðliga ímóti amerikansku avgerðini at leypa á Irak. Kanadiska stjórnin góðtók ikki amerikansku grundgevingarnar fyri at seta álopið í verk.

## Ungverjar søgdu ja

Leygardagin var fólkaatkvøða í Ungarn um limaskap í ES, og har var eingin ivi.

Tá uppteljingin var liðug, høvdu meiri enn 80 prosent atkvøtt fyri, at Ungarn skal fara upp í ES, meðan bert 16 prosent høvdu atkvøtt ímóti. Harafturímóti var áhugin fyri fólkaatkvøðuni lítil, tí bert góð 40 prosent av veljarunum nýttu høvi at siga sína hugsan.

Nú hava trý av umsøkjaralondunum sagt endaliga ja til limaskap í ES. Tey eru Malta, Slovenia og nú Ungarn. Danski uttanríkisráðharrin, Per Stig Møller, er fegin um úrslitið í Ungarn. Hann vónar, at tað fer at eggja fólkinum í hinum londunum í Eysturevropa til at taka somu støðu.

# Sýrialand hevur hópoyðingarvápn



*Sýriski uttanríkisráðharrin, Farouq al-Shara, vísir amerikansku skuldsetingunum aftur og biður USA leggja prógvini á borðið*

**George W. Bush, forseti vil vera við, at Sýrialand hevur evnafrøðilig vápn.**

HÓPOYÐINGARVÁPN
*Árni Joensen:*

-Vit halda, at Sýrialand hevur evnafrøðilig vápn.

Tað segði amerikanski forsetin, George W. Bush, um vikuskiftið. Frammanundan hava bæði Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri og Colin Powell, uttanríkisráðharri ávarað Sýrialand ímóti at hjálpa tí, sum er eftir av stýrinum hjá Saddam Hussein í Irak.

Skuldsetingarnar um hópoyðingarvápn vóru tann fyrsta orsøkin til, at USA og Bretland lupu á Irak, men amerikanski forsetin vildi ikki siga, um Sýrialand er í somu støðu sum Irak.

- Vit taka tað týdningarmesta fyrst. Vit eru í Irak nú, men eg vænti, at Sýrialand fer at samstarva við okkum, segði Bush og legði afturat, at Sýrialandi nýtist bert at samstarva.

- Sýrialandi nýtist at samstarva við USA og okkara sameindu. Landið eigur ikki at hýsa limum í Baathflokkinum hjá Saddam Hussein ella hernaðarligum leiðarum í Irak, sum skulu standa til svars fyri gerðir sínar í Irak, segði Bush. Stutt frammanundan hevði Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri sagt, at Sýrialand ger fleiri mistøk í løtuni.

Sýriski uttanríkisráðharrin, Farouq al-Shara, vísti í gjár amerikansku skuldsetingunum aftur.

# Russar njósnaðust fyri Irak

**Tað er komið fram, at Russland njósnaðist fyri Irak upp undir kríggið í Irak.**

NJÓSNING
*Árni Joensen:*

Bretska blaðið Sunday Telegraph avdúkaði sunnudagin, at russiskir myndugleikar lótu iraksku myndugleikunum ymsar loyniligar upplýsingar so sum frásøgn frá einum fundi millum bretska forsætisráðharran, Tony Blair, og italska starvsbróður hansara, Silvio Berlusconi.

Sambært blaðnum stava upplýsingarnar frá skjølum, sum eru funnin á skrivstovuni hjá iraksku fregnartænastuni, eftir at amerikanarar komu til Bagdad.

Skjalið viðvíkjandi fundinum millum Blair og Berlusconi er dagfest 5. mars í 2002 á iraksku sendistovuni í Moskva og snýr seg um ein fund, sum teir báðir forsætisráðharranir høvdu í Rom tríggjar vikur frammanundan. Har er Blair endurgivin fyri at hava sagt, at Bretland er ikki sinnað at taka undir við einari amerikanskari ætlan um hernaðarátak ímóti Irak, fyrr enn viðurskiftini í Afghanistan eru komin í rættlag.

Hvussu russar hava fingið fatur á hesum upplýsingunum, er ein gáta, skrivar Sunday Telegraph, sum ikki ivast í, at avdúkingin fer at fáa álvarsamar avleiðingar fyri viðurskiftini millum Bretland og Russland og ikki minst fyri tey annars so góðu viðurskiftini millum Tony Blair og Vladimir Putin, forseta.

Sambært Sunday Telegraph lótu russar eisini irakum eitt yvirlit yvir leigudrápsmenn, sum kundu hugsast at vera sinnaðir at átaka sær morð í Vesturheiminum. Einki stendur um, hvat russar ella irakar hugsaðu um í hesum føri, men bretska blaðið heldur hetta vera eitt tekin um, hvussu langt russar vóru sinnaðir at fara í samstarvinum við irakar.

Yvirgangsmaðurin Osama bin Laden er nevndur í fleiri av skjølunum, men tey snúgva seg stuðul hansara til uppreistrarmenninar í Kekenia.




Føroya Handilsskúli søkir eftir

LÆRARUM OG TÍMALÆRARUM

**til skúlarnar í Tórshavn og á Kambsdali frá 1. august 2003. Hevur umsøkjari útbúgving í lærugreinum, sum nøkta tørv skúlans, kann talan verða um fast starv.**

**Tímar eru leysir at søkja í lærugreinunum niðanfyri. Tímatølini í klombrum eru vegleiðandi.**

**Tórshavn**

**FHS:**
Virkisbúskapur (8 t/v), Enskt (4 t/v), Fiskivinna (6 t/v), Marknaðarførsla (4 t/v), Samfelagslæru (8 t/v), Støddfrøði (10 t/v), Kunningartøkni (4 t/v), Dekoratión (3 t/v), Spanskt (4 t/v), KT (4 t/v), og Føroyskt (8 t/v)

**HH:**
Føroyskt (8 t/v), Sølubúskapur (4 t/v), Enskt (4 t/v), Støddfrøði (5 t/v), Samtíðarsøga (12 t/v), Altjóða búskapur (5 t/v), Vinnulívsrættur (6 t/v), Fyriskipan (4 t/v), Danskt (15 t/v), Sálarfrøði (4 t/v)

**Kambsdalur**

**FHS:**
Enskt (4 t/v), Týskt (4 t/v), Kunningartøkni (12 t/v), Marknaðarførsla (4/v), Støddfrøði (14 t/v), Fiskivinna (3 t/v), Dekoratión (3 t/v), Talfatan (2 t/v) og Sálarfrøði og tænasta (2 t/v)

**HH:**
Føroyskt (8 t/v), Danskt (9 t/v), Enskt (8 t/v), Samtíðarsøga (12 t/v), Støddfrøði (10 t/v), Vinnulívsrættur (3 t/v), Sálarfrøði (4 t/v), Sølubúskapur (8 t/v) og Mentanarfatan (4 t/v)

**Fyri lærarar í farloyvi á Kambsdali, eru tímar leysir at søkja í niðanfyristandandi lærugreinum:**

Týskt (4 t/v), Føroyskt (4 t/v), Samfelagslæra (8 t/v), Sølubúskapur (9 t/v), Marknaðarførsla (4 t/v) og Altjóða búskapur (5 t/v)

**Arbeiðsuppgávur:**
∉ undirvísa í viðkomandi lærugreinum
∉ leggja til rættis undirvísingargongdir
∉ luttaka í toymisarbeiði
∉ vera við í ráðlegging skúlans
∉ luttaka í verkætlanum, sum skúlin skipar fyri

**Vit vænta, at tú:**
∉ hevur viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni t.d. cand.merc., cand. mag., BA, BS, HD, ED
∉ hevur áhuga í undirvísing
∉ dugir væl at samstarva
∉ dugir væl at samskifta
∉ vilt vera við at menna skúlan
∉ ikki ræðist nýggjar avbjóðingar

**Vit kunnu m.a. bjóða:**
∉ eitt fakligt mennandi umhvørvi
∉ eftirútbúgvingarmøguleikar
∉ eitt arbeiðspláss í støðugari menning
∉ góðar arbeiðsumstøður
∉ ein spennandi og lívligan gerandisdag
∉ spennandi avbjóðingar

**Setanarkor til fast starv:**

Fyrstu 2 árini verða roknað sum royndartíð. Lærarar, sum settir verða í fast starv, mugu vera til reiðar at fara undir kravda námsfrøðilga útbúgving skjótast gjørligt. Eisini mugu teir rokna við í ávísan mun at skula undirvísa á fleiri stigum og partvís um kvøldið og á báðum handilsskúlunum, gerst tað neyðugt.

**Løn:**

Lærarar verða løntir í HL- lønarrensli 13/21/24, 18/26/29 ella 16/21/29/31.

**Umsókn:**

Umsóknir um fast starv við ljósprentum av próvskjølum o.ø., skulu stílast til Føroya Handilsskúla, stýrið, og umsóknir um tímalærarastarv skulu stílast til Føroya Handilsskúla. Umsóknin skal sendast skúlanum, sum umsøkjarin ætlar at starvast á, t.v.s. antin Føroya Handilsskúla í Tórshavn, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177 ella Føroya Handilsskúla á Kambsdali, 530 Fuglafjørður. Umsóknirnar skulu verða skúlanum í hendi **í seinasta lagi 2. mai 2003**. Umsóknarblað fæst á skúlunum ella á heimasíðu skúlans www.fh.fo.

Nærri upplýsingar um størvini í Tórshavn kunnu fáast við at venda sær til Ragnar Magnussen, stjóra, á telefon 317177 ella rm@hsh.fo, og um størvini á Kambsdali við at venda sær til Páll Isholm, deildarstjóra, á telefon 444900/219930 ella palli@kambsdal.olivant.fo.

*Á Føroya Handilsskúla ganga umleið 200 næmingar á Hægri Handilsskúla (HH) og 200 á Fyrisiting, Handli og skrivstovu (FHS). Undirvísingin fer fram í Havn og á Kambsdali. Í Havn starvast um 35 og á Kambsdali 20 lærarar. Umframt HH og FHS skipar Føroya Handilsskúli fyri kvøldskúla og framhaldsútbúgvingum, so sum teldustøðingaútbúgvingin, Master of Management, HD, datanom og merkonom.*